Bygdarráðsformaðurin ikki í søguna

Føroya Kommunufelag hevði mikudagin fund, har felagið gjørdi síni tilmæli til nýggju kommunulógina. M.a. var ikki meiriluti fyri at avtaka bygdarráðsformannin og seta borgarstjóra í staðin í fulltíðarstarv, sum nýggja kommunulógin mælir til. Hesin skal so eisini siga sítt borgarliga starv frá sær, men stendur tað til Kommunufelagið, so hendir hetta ikki

DAGFINN OLSEN

Allar 40 kommunurnar í Føroya Kommunufelag viðgjørdu mikudagin broytingarnar í kommunulógini og gjørdu tilmæli.

Jógvan K. Mørkøre, formaður í Føroya Kommunufelag sigur, at m.a. var á skránni, at kommunurnar skulu hava størri málsøki at umsita. Aðrar nýggjar greinar í lógini eru t.d luttøka í vinnulívinum, kommunalt samstarv og loft á lántøkum.

Kommunufelagið skal ummæla lógaruppskotið og handa landsstýrinum hetta innan 1. februar.

Borgarstjórar fulla tíð

Ein grein í nýggju lógini sigur, at bygdarráðsformenn fara í søguna. Ístaðin koma borgarstjórar, ið hava hetta sum starv fulla tíð. Teir skulu so siga sítt borgarliga starv frá sær.

Hesum tók kommunufelagið ikki undir við.

– Tað varð hildið, at hetta bar ikki til. Eingin tvungin kommunusamanlegging verður og tað ber ikki til at krevja, at ein bygdarráðsformaður skal vera løntur fulla tíð og siga størv frá sær. Heldur ikki ber tað til peningaliga í lítlari kommunu, tí tað er ov dýrt, sigur Jógvan K. Mørkøre.

– Tað er ásett í kommunulógini, at tað er borgaraskylda at vera valdur í kommunustýrið og borgaraskylda at taka við sum formaður. Samstundis kann ikki krevjast av einum, at hann sigur starv frá sær við vanda fyri, at hann ikki kann nýtast aftur í arbeiði. Vit skjóta upp, at kommunustýrini sjálvi taka støðu til hetta, um tey meta tørvin vera til staðar, sigur Jógvan K. Mørkøre.

Arbeiðsgevarar førdu fram, at farloyvi neyvan koma upp á tal, tí ikki er óvanligt, at arbeiðsgevarar gera íløgur í starvsfólk, skúla tey, um teir meta, at tey hava hug at halda fram í starvinum. Um tey so verða vald stutt eftir, so hongur ikki saman.

Færri limir

At seta loft á lántøkur hevði eingin nakað ímóti á fundinum í Føroya Kommunufelag.

- Men í lógini stendur, at tal á bygdarráðslimum kann vera millum 7 og 17. Her hildi vit, at eitt lægri tal enn 7 hevði verið betri hóskandi. Í kommunum við upp til 1500 íbúgvum mettu vit, at hóskandi er at hava 3 til 9 limir á bygdarráðnum, sigur Jógvan K. Mørkøre.

Luttøka í vinnulívinum

– Nú er sett sum lógargrein, at kommunur ikki skulu hava virknan leiklut í vinnulívinum ella vinnuligum endamálum, uttan í serstøkum førum. Serstøk føri merkir t.d. ikki, at kommunan kann bjarga arbeiðsplássum ella skapa arbeiðspláss. Eftir lógini er tað nærum ongantíð. Kanska, um vandi er fyri, at kommunan doyr út. Men tyngdin, prógvgrundin liggur hjá kommununi fyri, at hon kann gera hetta. Vit høvdu ikki nógv at viðmerkja, tí lógargreinin er rættiliga opin og vit meta, at hon stendur og fellur við, hvussu er við kommunala eftirlitinum, hvør siðvenjan verður, sigur Jógvan K. Mørkøre, formaður í Føroya Kommunufelag



Jógvan K. Mørkøre, formaður í Føroya Kommunufelag

Ráðstevna um Heinesen og Jacobsen

Í døgunum 25. - 27. mai, verður skipað fyri ráðstevnu um skaldskap William Heinesens og Jørgen-Frantz Jacobsens

DAGFINN OLSEN

Undir heitinum »Oceaniske Dage«, verður í døgunum 25. - 27. mai skipað fyri umfatandi ráðstevnu um skaldskapin hjá tveimum av okkara fremstu rithøvund-um, William Heinesen pg Jørgen-Frantz Jacobsen.

Stóran týdning

Í faldaranum, ið lýsir tiltakið, verður sagt, at teir báðir hava ómetaligan týdning fyri føroyska mentan. Umframt eru teir frammaliga í norðurlendskum bókmentum. William skrivaði yrkingar, skaldsøgur og stuttsøgur. Jørgen-Frantz skrivaði skaldsøguna Barbara og greinar um politikk og mentan.

Altjóða týdningur teirra kemur til sjóndar við, at bøkur teirra stutt eftir útgávu vórðu týddar til fleiri mál.

William og Jørgen-Frantz vóru baðir føroyingar, ið skrivaðu á donskum. Hetta hevði ávirkan á samtíðar viðurkenning í Norðurlondum og legði leiðina opna fyri altjóða týðing.

Skaldskapur teirra endurspeglar í evnum og málbúna ávísar síður ísøguligu og samfelagsligu gongdini í ungum tjóðum, ið eru við at finna egnum tjóðsamleika.

Mál

Faldarin sigur endamálið við ráðstevnuni vera at granska hesar síður í skaldskapinum, seta í mentanarsøguligt samanhang og vísa, hvussu »nation-building« royndirnar koma fram.

Eisini er endamálið at geva íblástur til bókmentaligt arbeiði við verkunum hjá William og Jørgen-Frantz.

Ráðstevnan tekur upp skaldskapin, mál og mentan og skaldskaparstøðu William Heinesens og Jørgen-Frantz Jacobsens í føroyskum og norðurlendskum høpi.

Fyrilestrar og filmar

Kjarnan í ráðstevnuni verða fyrilestrar um høvundarnar báðar og aðrar útvaldar høvundar. Um sambandið teirra millum, støðu í samfelag og mentan og um málsligar spurningar.

Eisini vera arbeiðsbólkar, har luttakararnir hava møguleika at siga nøkur orð um verk ella høvund. Skotið verður upp, at hetta tekur einar 20 minuttir.

Á ráðstevnuni verður málið skandinaviskt. Fyrilestrar kunnu eisini vera á enskum.

Verk eftir bæði William Heinesen og Jørgen-Frantz Jacobsen eru flutt á pall og gjørd til film. Á ráðstevnuni verður møguleiki at síggja filmin Barbara og filmin Dansinn. Eisini verður møguleiki at kanna sjónleikin Glataðu Spælimenninir eftir bókini hjá William Heinsen og sjónvarpssamrøður og dokumentarfilmar verða eisini at síggja.

William fekst eisini við myndlist og tónleik og ein framsýning verður við myndum hansara og ein konsert við tónleiki eftir William.

Um viðrar, so verða eisini gjørdir túrar til gongu og við skipi. Túrar, sum taka støði í bókaverkunum.

Leiðslan

Fakligu leiðsluna á ráðstevnuni hava raktarin á Fróðskaparsetrinum, Malan Marnersdóttir, lektari, ph. d,. og Turið Sigurðardóttir, lektari, mag. art.

Fyrireikarar eru Helga Hjørvar, stjóri í Norðurlandahúsinum, Martin Næs, landsbókavørður og Gunnar Hoydal, formaður í Rithøvundafelag Føroya.

Ynskir ein at luttaka á ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum, kann ein siga frá í húsinum. Kostnaðurin er 400 krónur fyri fyrilestrar, tilfar og kost.

Tillagað mynd: Álvur Haraldsen

Biðja fyri fólki beinleiðis

Jenis av Rana fer at hava forbøn fyri opnari mikrofon á útvarpsstøðini Lindini, og MC Restorff skal nú royna seg sum útvarpsmaður

EYFUN KLAKSTEIN

Útvarpsstøðin Lindin fer at taka ein nýggja tátt upp, tá tey fara undir at senda í dag.

Sambært fyribilsskránni hjá útvarpsstøðini fer Jenis av Rana hvørt mikukvøld at hava eina sending, har hann fer at biðja fyri fólki fyri opnari mikrofon.

– Vit hava áður havt telefonlinju, har fólk hava kunnað ringt inn og biðja okkum biðja fyri onkrum, sum liggur teimum á hjarta, og tá kom tað óvart á okkum, hvussu stórur hesin tørvur er, sigur Preben Hansen, sum er formaður í nevndini hjá Lindini.

Hann hevur saman við millum annað Jenis av Rana havt opnar telefonlinjur síðani einaferð í 80'unum.

Ætlanin er, at fólk kunnu ringja inn, og biðja Jenis biðja fyri teimum ella øðrum. Fólk nýtast ikki at uppgeva navn, og Jenis fer so at biðja fyri opnari mikrofon.

– Vit fara at byrja við eini slíkari sending, men ætlanin er, at vit hvønn dag fara at hava eina stutta sending við forbønum, sigur Preben Hansen.

Ætlanin er, at fólk skulu hava møguleika at ringja til Lindina millum 17.00 og 18.00, og so verður ein stutt bønarsending í 10 minuttir frá klokkan 18.00.

– Vit fara eisini at biðja fólk siga frá, tá tey hava fingið bønarsvar, sigur Preben Hansen.

MC útvarpsvertur

Fyrstu tíðina verður nógvur tónleikur sendur á Lindini, men tey ætla so líðandi at vaksa um talið á veruligum sendingum.

– Alt arbeiðið á støðini verður gjørt sjálvboðið, og vit eru amatørar, tí verða bæði mongdin og dygdini merkt av hesum, men vit ætla sanniliga at betra okkum allatíðina, sigur Preben Hansen.

Millum tey fólkini, sum fara at gera sendingar fyri Lindina, er MC Restorff, sum annars serliga er kendur fyri sína tónleikakarrieru. Hann fer saman við Símuni Hansen at gera eina sending, sum fer at snúgva seg um sjólív og átrúnað.

Hendan sendingin verður send leygardag kl. 17.00, og Preben Hansen væntar sær nógv av hesi sendingini.

Annars eru sendingar, sum venda sær serliga til børn og ung eisini á skránni.

Fólk uttanfyri Havnina gera tíðindi

Og tíðindi um andalig viðurskifti í Føroyum og úti í heimi verða eisini á skránni.

Byrjað verður við einari sending í næstu viku, men síðani er ætlanin at fáa tíðindi í lag hvønn dag í vikuni.

Tað verða fólk í Havn og kring landið, sum fara at skriva tíðindi. Lindin hevur fingið avtalu við fólk í Klaksvík og á Skálafjørðinum at finna, skriva og lesa tíðindi. Hesi fólk hava fingið ein digitalan banduppptakara til at lesa tíðindini inn á, og síðani verður antin bandið sent til Havnar ella verða tíðindini send yvir internetið.

Lindin ætlar, at tað ikki bara skulu verða teir, sum hava ágóðan av fólki uttanfyri Havnina.

– Okkara fremsta mál er at víðka um sendiøki, so vit framyvir eisini kunnu hoyrast ymsastaðni í Eysturoynni og í Klaksvík, sigur Preben Hansen.

Jenis av Rana fer at biðja fyri fólki fyri opnari mikrofon á útvarpsstøðini Lindini. Mynd: Álvur Haraldsen

Fólk frá Granskingarverkætlanini fyri økismenning á vitjan á Kósini í Klaksvík. Frá vinstru: Svein Jentoft, Bjarni Mortensen, Richard Apostle, Dennis Holm og Ólavur Waag Høgnesen. Mynd: Dávur Winther

Vitja virki og feløg

Granskingarætlanin fyri økismenning er farin undir sítt virksemi.

Í vikuni vitjaðu fólk frá Granskingarætlanini virki og feløg í norðoyggjum.

Tað er kanadiumaðurin Richard Apostle, sum skal verða leiðari fyri granskingini.

Granskingarætlanin fer at halda til í gomlu politistøðini í Klaksvík, sum farnu vikurnar hevur verið umvæld. Tað er Klaksvíkar kommuna, sum hevur keypt og goldið fyri umvælingarnar av gomlu politistøðini.

UNITED COLORS OF BENETTON. UNITED COLORS OF BENETTON. UNITED COLORS OF

Mánadagin, týsdagin og mikudagin

÷20%

Hósmorgunin 27/1 kl. 08.00 byrjar tann stóra útsølan

UNITED COLORS OF BENETTON.

Sverrisgøta 17 • 100-Tórshavn • Tel. 317661

UNITED COLORS OF BENETTON. UNITED COLORS OF BENETTON. UNITED COLORS OF